# ri bakka



*Mikkjal Hammer er reiðari á lemmatrolaranum Sjagakletti (mynd), sum P/F Sjagaklettur í Hvalba eigur. Teir, sum eiga hetta partafelag, er felagið P/F Steintór, sum eisini eigur lemmatrolaran Steintór.*

tænasta svíkur oftari nú enn áður, og tað er greitt, at hetta gongur útyvir fiskaprísirnar, tí keyparar aftra seg við at keypa undir ivingarsomum umstøðum við flutningi.

Mikkjal sigur, at hetta gongur ikki minst útyvir tey fiskasløg, sum lemmatrolararnir veiða, tí hesi enda partvís á feskfiskamarknaðinum.

## At partrola

Nevndarlimurin í felagnum Lemmatrolarar vísir á, at tá ið umstøðurnar hjá hesum parti av flotanum eru vorðnar so truplar, er greitt, at menn gera alt fyri at reka skipini so bíliga sum tilber.

- Vit hava tí viðgjørt ymiskar møguleikar, og ein av hesum er, um tað kanska hevði verið ein gongd leið at roynt við partroli.

Hann sigur, at tað eru eini seks ár, síðan hesin spurningur fyrstu ferð kom uppat venda, og at felagið kannaði málið hjá fiskiveiðimyndugleikunum.

- Vit hava tikið spurningin upp við landsstýrið, men har er einki hent. Undir seinastu landsstýrissamgongu varð spurningurin eisini reistur, men landsstýrismaðurin vildi ikki geva okkum loyvi at royna við partroli, hóast hugsandi er, at nøgvur peningur er at spara í oljuútreiðslum.

Nú feløg, ið varða av lemmatrolarum, aftur hava vent sær til landsstýrið, fegnast Mikkjal Hammer um, at nýggi landsstýrismaðurin er sinnaður at røða um spurningin og koma til eina niðurstøðu í hesum máli.

- Teir, ið hava skil fyri partoli og vita, hvat tað í síni tíð merkti fyri teir smærru trolararnar, siga, at oljuútreiðslurnar minkaðu við 40%. Hetta hevði sjálvsagt verið munagott og kundi soleiðis verið ein partur av loysnini, um partrol annars vísir seg at rigga í okkara veiði.

Hann sigur, at nú so nógv verður tosað um útlát, minni oljunýtslu og reinari umhvørvi, dugir hann ikki at síggja teir stóru trupulleikarnar við at loyva partrola.

- Í mínari verð tikist tað hol í høvdi, sum hann tekur til, at myndugleikarnir skulu aftra seg við at loyva partroli hjá lemmatrolarum, tí honum kunnugt stendur einki í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum forðar hesum.

Mikkjal Hammer heldur tað eisini vera spell, at Fiskimannafelagið skal vera so avgjørt um, at tað als ikki kann koma upp á tal, at fiskimenn luttaka í einum parti av øktu oljuútreiðslunum, sum nú eru við at taka grundarlagið undan lemmatrolarunum, sum hóast alt geva arbeiði til nógvan fiskimenn, eins og teir geva grundarlag fyri stórum virksemi uppi á landi.

- Tá viðurskiftini broytast so fullkomiliga, sum við øktu oljuprísunum, er neyðugt, at allir partar viðvirka til at finna loysnir, so vinnan kann halda fram, sigur reiðarin og nevndarlimurin í felagnum Lemmatrolarar.




*Nýggjar leiðir mugu gangast – ella onnur stig takast – um teimum 13 djúpvatnstrolarunum skal vera lív lagað við verandi oljuprísum, fiskiskapi og fiskaprísi*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Partrol ein gongd leið hjá lemmatrolarum

**Formaðurin í Reiðarafelagnum sigur, at soleiðis, sum gongdin er í løtuni hjá lemmatrolarunum, er tað bara ein spurningur um tíð, nær hesir verða lagdir – og teimum á baki koma so partrolararnir. Fiskimannafelagið vil ikki, at fiskimenn skulu taka lut í oljuútreiðslunum**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Oljan er vorðin ein alsamt meira tyngjandi partur í føroyska samfelagnum, sum er so tengt at hesi orkukeldu. Kring um í húsarhaldunum merkist økti prísurin við hægri mánaðargjøldum fyri olju, men serliga er tað í fiskiflotanum, sum onga aðra orkukeldu hevur, at oljan kennist sum ein lemjandi partur av útreiðslunum.

Allur fiskiflotin er tengdur at oljuni, men ymiskt er, hvussu nógv olja gongur – alt eftir, hvør skipabólkurin og reiðskapurin er. Tað er bara í tveimum skipabólkum, at manningin beinleiðis luttekur í oljuútreiðslunum. Hetta er hjá verksmiðjuskipum og línubátum.

## Oljan tvífaldað

Ein av teimum skipabólkum, sum eru harðast raktir, nú oljan er vorðin so dýr, eru djúpvatnstrolarar ella lemmatrolarar, sum teir eisini verða róptir.

Oljan táttar nú í 5 krónur fyri liturin. Tað er meira enn tvífalt so nógv, sum fyri bara fimm árum síðan. Taka vit seinasta ár, fór umleið ein triðingur av veiðivirðinum hjá hesum skipum til oljurokningar. Tað er meira, enn nakar skipabólkur kann liva við í longdini.

Støðan hjá teimum 13 lemmatrolarunum er tí ikki góð, men meira at kalla døpur – fyri ikki at siga vónleys, um einki verður gjørt.

Tá ið fiskiskapurin ikki roynist, og fiskaprísirnir ikki eru teir bestu, noyðast feløgini, sum eiga hesi skip, at leggja pening út, hvørja ferð skipini loysa.

Og tað gongur heldur ikki í longdini.

Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið hava tosað um oljuna, men hóast felagið hjá reiðarunum hevur sagt, at høgu oljuprísirnir fara at leggja ein stóran part av flotanum, vil felagið hjá fiskimonnum ikki hoyra talan um, at fiskimenn skulu rinda fyri olju.

Formaðurin í Reiðarafelagnum hevur sagt, at soleiðis, sum gongdin er í løtuni, er tað bara ein spurningur um tíð, nær lemmatrolararnir verða lagdir – og teimum á baki koma so partrolararnir.

Í januar, tá loysn fekst á sjómannaverkfallinum, sum tá hevði vart í einar 18 dagar, samdust partarnir um at hittast aftur seinni, har roynt skuldi vera at finna eina semju, um oljuprísurin framhaldandi fór at økjast.

Nú sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum, at hann er fúsur at práta um viðurskiftini, men at hetta ikki verður til meira enn prát. Hann sigur, at felagið hevur einki ímóti at tosa um oljuna, men felagið gongur ikki við til, at fiskimenn skulu rinda fyri olju.

## Kanska partrol

Felagið hjá Lemmatrolarum hevur víst á ymisk viðurskifti, sum kanska kundu bøtt um gongdina hjá hesum partinum av flotanum, og eitt av ynskjunum hevur í fleiri ár verið, at hesi skip kunnu sleppa at partrola og soleiðis spara eini 40% av oljuútreiðslunum – um tey spara eins nógv, og teir smærru trolararnir gjørdu, tá teir í sínari tíð fóru at partrola.

Tað eru eini seks ár síðan, at teir, ið hava lemmatrolarar, fyrstu ferð vendu sær til landsstýri við fyrispurningi um partrol, og roynt varð eisini at fáa undanfarnu samgongu at loyva hesum.

Men har hevði hesin skipabólkur einki at heinta.

Nú viðger Fiskimálaráðið so aftur eina umsókn frá tveimum lemmatrolarum, sum hava hug at royna við partroli.

Nýggi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur sagt, at so skjótt, sum viðgerðin í Fiskimálaráðnum er liðug, fáa umsøkjararnir svar.

Bólkurin, sum fevnir um teir 13 lemmatrolararnar, er ikki undir fiskidagaskipanini, og tí hava skipini loyvi at royna alt árið.

Líkt er tó til, at nýggjar leiðir mugu gangast, um hesum skipabólki við verandi oljuprísum, fiskiskapi og fiskaprísi skal verða lív lagað.